Føroyingur danskur býráðslimur

Við seinasta kommunuval í Danmark varð Ragnar Johansen valdur í býráðið í Nakskov. Tilsamans fekk býráðið í Nakskov fimm nýggjar limir við seinasta val

Við seinasta kommunuvalið í Danmark, sum varð hildið 4. mars, var Ragnar Johansen, ið er sonur Sámal Johansen, millum teir fimm nýggju býráðslimirnar, sum valdir vórðu í Nakskov.

Ragnar er valdur av javnaðarflokkinum, og fekk tilsamans 64 persónligar atkvøður.

Av tilsamans 21 limum í býráðnum í Nakskov hevur javnaðarflokkurin teir 14. Triggir limir umboða SF-flokkin, meðan restin umboðar teir borgarligu.

Í viðtali við SOSIALIN sigur Ragnar Johansen, at Nakskov er kendur fyri at hava sterka javnaðarumboðan í býráði. Býurin verður annars skýrdur at vera hin reyðasti býurin í Danmark.

Meiriluta síðan 1913

— So langt eg kann minnast hevur javnaðarflokkurin havt meiriluta í býráðnum í Nakskov síðan 1913, sigur Ragnar.

Hann leggur aftrat, at núverandi borgarstjórin, sum er valdur av javnaðarflokkinum, hevur sitið í hesum starvi í 12 ár. Borgarstjórin undan honum, sum eisini var javnaðarmaður, sat í 25 ár.

— Tað skal ikki dyljast, at tað er javnaðarflokkurin, sum av hesi orsøk leggur ta politisku linjuna í býráðnum í Nakskov, sigur Ragnar. Hann fýlist tó á, at hin vinstraflokkurin, SF-flokkurin, alt ov ofta atkvøður saman við teimum borgarligu. Hetta hevur tó ikki nervað samarbeiðið millum báðar vinstraflokkarnar, sigur hann.

Búð í Nakskov í 6 ár

Ragnar Johansen hevur búð og starvast í Nakskov sum lærari í seks ár. Upprunaliga ætlan hansara var bert at verða í Danmark í eini tvey ár.

— Eg havi altíð havt áhuga fyri politikki, men kortini kann ikki sigast, at nakar ynskidreymur er gingin út, hóast eg nú eri vorðin aktivur politikkari, sigur hann.

— Tað vóru mest lærarar, sum heittu á meg um at gerast valevni til kommunuvalið seinasta, og eg tók av. Teir hildu tað vera beint, at læraraumboðan kom í býráðið. Tað er altíð vandamikið at verða valdur politikkari av einum felagsskapi, men higartil havi eg bert ásannað tað positiva við hesum.



Ragnar Johansen, sum nú er býráðslimur í Nakskov

Mær hevur býðst høvi at leggja fram sjónarmiðini á ein heilt annan hátt í hesum sambandi, greiðir Ragnar frá.

Atkvøður frá lærarum

Ragnar heldur seg hava fingið tær flestu atkvøðurnar frá starvsfeløgum sínum Tó gitir hann, at nakrar atkvøður eru komnar frá føroyingum í Nakskov. Teir eru um 30 í tali.

At kalla allar nevndirnar, Ragnar er limur í, arbeiða við skúlamálum.

Hann er limur í m.ø. skúlanevndini, fritíðarkommissiónini, er næstformaður í mentunarnevndini og limur í stjórnini fyri handilsskúlan í Nakskov.

— Millum tey mál, sum javnaðarflokkurin í løtuni streingir á at fáa framt, er ognartøka av stórum lendi norðan fyri Nakskov, ið skal nýtast til idnaðarøki. Ætlanin er at fáa sett á stovn felags idnað í samarbeiði við triggjar grannakommunur.

Allar fýra kommunurnar skulu rinda byggibúnaðin.

Hetta førir m.a. við sær, at fólk sleppa undan at flyta til Nakskov fyri at fáa høgligari atgongd til arbeiðisplássið.

Eitt hjartamáli Ragnars at fáa framt var ein meiri positiv áskoðan um skúlaviðurskifti. Hann sigur, at longu nú er framburður at kenna á hesum øki.

Stillar seg uppaftur

Uppá spurningin, hvør hann hevur áhuga at gerast valevni til komandi kommunuval í Danmark, sigur Ragnar:

— Tað er kanska í fyrra lagi at siga nakað nú. Men verði eg nøgdur við avrikið í inniverandi valskeiði, fari eg helst at stilla meg uppaftur.


Við valið í mars var Ragnar valdur sum seinasti maður á listanum. Javnaðarflokkurin stillaði upp við 21 valevnum. Stillað varð upp í nummarrað, og Ragnar var nr. 15.

Bróðir Ragnars, Finnur Johansen, er eisini býráðslimur.

Við seinasta býráðsval í Havn varð Finnur nývaldur. Hann er í løtuni figgjarnevndarformaður Tórshavnar býráðs.

sosialurin
telf. 11820

HUSMOR VINDUET



Góðska í hvørjum einstøkum luti.

Kann læsast í tveimum ymiskum støðum (barnatrygd og vaskistøða).

Kann koppast 180 gradir uttan at tað kemur inn í rúmið — gongur sostatt frítt av urtapottum og gardinum.

Umboð fyri Nanset Trevarefabrikk

Svend Krosstein
tlf 14600

ÓLAVSVØKU-KANTATAN 1974

Og Ólavur gamli kongur meðan hvast stál skræddi
tin búk upp og gróv seg inn í tínar tarmar og meðan lívið
spulaði úr tær í feitum strálum frá avkutaðum æðrum
tá mundi tú ikki ætla at tín deyði skuldi gerast
til eina slíka æviga árliga veitslu vesturi í havi.

Og kanska onkur minnist tínar beinaleivdir eitt lítið bil
áðrenn hann setur eina kalda akvavitt fyri munnin og
letur lívsins vatn kitla barkan og gleðina.

Og menn bestilla gull og elefantar og giraffar og hoffar
og grønar og bláar og aalborg og brøndum og taffel og gin
og whisky og rom og pernod og cognac og likør og portvín
og reyðvín og hvítvín og sherry og madeira og gott er
at kenna sega tryggan.

Og man snollar seg upp og vaskar sær og fer í bað og
summi undir brúsuna og man klippir sær og rakar sær og
fer til frisør og keypur sær nýggj klæðir og skógvar
og fyllir seg við parfumu og barberspritti og deodorantspray
fyri at man kann vera so lekkir og labir sum til ber
á ólavsvøku.

Og har er skrúðgonga og fløgg og larmur og frøi
og stevnan verður sett og havnar hornorkestur spælir
marchar dum da dumm dum da dumm dum da dumm dum
da dumm dum da dumm dum da dumm dum da dumm dum
da dumm dum da dumm.

Og nakrir fáa sær ein dropa og aðrir smakka sær á
og summir fáa upp í høvdið og summir hava ein ráka og
summir eina føring og summir hava eitt pirk og summir
eina kenning og teir flestu eru bara etandi skít.

Og guff guff og heitar hundar og stoktar pylsur og
kókaðar pylsur og ketchup og sinnop og búffar
við agurkasalati og kyllingar við chips og salti og eddikki
og eplamosi og ísi og sodavatn og candy-floss og poppcorn
og chokolátu og stórar luftballónir og enn størri hvítir
cowboyhattar og tombola og seymsláðing og eydnuhjól
og stórar dukkur og plastikbilar.

Og koyr á háheeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeeee
og hann fintar og hann krússar og hann skýtur og hann situr
í netinum (wwauuuwwhhhjajjaaaaaahhmáááááál!)
og koyr á sílið og nú og nú og nú og nú og nú og nú og nú og nú
og hvítar skjúrtur og kappriðing og koyrlarnir bresta
í rossasveittan og rossini tvíspora fram móti málinum
gunkre gunkre gunkre gunkre gunkre gunkre gunkre gunkre
og taparir og vinnarar og lógvabrestur og hurrá og stórir
blankir steypar og teir leingi livi.

Og dansurin gongur og tað er ólavsvøka og vátir
ólavsvøkulabbar knúsa spengur og skræða ormin
úr neystinum og onkur diskjokkey roynir-at-fáa-øll-við-
ti-tað-skal-man-jú og goggan spælir sín æviga vals
og har er áh, so **heitt og so kvalið og trongt** og man træðkar
á tærnar og ýlur inn í oyruni á dansifelaginum
og man loysir sær slipsið og er kátur og tað er myrkt
og frísinnt og lívið er veldigt.

Og ferðafólkið undrast og gleðist yvir órar víkingar
sum eru slopnir leysir og fotografera tjóðarbúnar og fuglar
og hús og avdotnar menn og nýta 10 kilometrar av filmi.

Og har er mentan og listarskálin er fullir av kunsti
og man gerst hátíðarligur og teskar og mutlar og er
spakur og hyggur varisliga at undrunum á veggunum.

Og føroyingurin er blíður og vertsskapsmaður og eitt tons
av skerpikjøti fer niður í svangar grúkar og summir gestir
eru vælsæddir og aðrir eru óðir í brennivíni og-tað-er-
ikki-so-avbera-gott-og-man-roynir-at-fara-væl-við-teimum-ja

Og onkur fellur í ást við onkrari søtari dullu so hann
má turka sær um føturnar aftaná og onkur blívur svikin
og narraður og skal knúsa tanngarðin á tí freka fananum
so jakslarnir dansa tango jalousi niður í magan.

Og ólavsvøkan heldur áframm og sólin skýnur á líkkur
við pylsupappíri um nevini og fylltar gøtur av óruddi
og stevnan kemur at enda og nógvir eru illa at holdi komnir
timburmenn byggja risaborgir men ólavsvøkan var **alletiders**
tú hin gamli og hin næsta verður skjótt fyri stavn.